Strandferðslan sóknast eftir

# roknskaparfólk/ controller

Av tí at okkara virkandi fíggjarleiðari – og annars roknskaparfólk/controllari á Fíggjardeildini – hevur sagt seg úr starvi, verður starvið sum roknskaparfólk/controllari lýst leyst til at seta skjótast gjørligt.

sansir.fo

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá roknskaparfólkinum/controllaranum er at menna fíggjarstýringina á SSL og at halda fast við menningina, ið hevur verið seinastu árini. Aðrar uppgávur eru:
- Játtanareftirlit (samlað og fyri rakstrarstað)
- Uppseting og viðlíkahald av mannagongdum
- Játtanarlig og roknskaparlig ráðgeving til deildarleiðarar
- Uppseting av hagtølum
- Ad-hoc lýsingar

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú hevur:
- hevur HA, HD, HH ella líknandi prógv
- hevur royndir innan bókhald, grannskoðan e.l.
- er hollur teldubrúkari
- hevur kunnleika og royndir í Navision-fíggjarstýringsskipanini og Microsoft Office forritunum
- hevur kunnleika til LøttLøn-lønarskipanina
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva
- hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga
- hevur góðan røkjuskap

Talan er um eitt starv við stórum og spennandi avbjóðingum, har ið tað stundum kann verða talan um átrokandi uppgávur. Samstundis fært tú tó møguleika fyri at skipa starvið sjálvstøðugt út frá givnu karmunum.

**Fíggjardeildin**
Høvuðsuppgávan hjá Fíggjardeildini er at veita leiðsluni eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna fíggjarstýringina hjá fyritøkuni. Aðrar uppgávur eru:
- Fyriskiping av roknskaparverkinum
- Uppseting av fíggjarætlanum
- Játtanareftirlit
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Innkeyps- og goymslustýring
- Lønarfyrisiting

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og er lønt í 6. lønarflokki.
Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Stílað: Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 26. mars 2007 kl. 12.00. Til ber eisini at senda umsóknina til t-postadressuna: pah@ssl.fo.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Rubeksen, virkandi fíggjarleiðara ella Niels Juel Arge, virkandi stjóra á tlf. 343000 ella senda t-post: jor@ssl.fo ella nja@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, og hevur sum endamál at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir (22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir). Talið á flutningsanleggum eru 40 bussar og 8 ferjur. Samlaða talið á starvsfólkum á SSL svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS


# TILTØK


SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800


**Føstugudstænastur**
**Mikudagin 21. mars**
***Havnar kirkja:*** kl. 20, Hans J. Joensen, biskupur
***Skála:*** kl. 20, Marjun Bæk
***Kollafjørður:*** kl. 20, Bjarni Bæk, dómpróstur
***Eiði:*** kl. 20 lestur
***Norðskála:*** kl. 20 Emil Olsen
***Fuglafjarðar kirkja:*** kl. 20, Meinhard Bjartalíð
***Tjørnuvíkar kirkja:*** kl. 19, Magnus Jørgensen
***Haldarsvíkar kirkja:*** kl. 20.30, Magnus Jørgensen
***Hvalvíkar kirkja:*** kl. 19, Mogens Tilsted Christensen
***Hósvíkar kirkja:*** kl. 20.30, Mogens Tilsted Christensen
***Gøta:*** kl. 20, Inga Poulsen Dam
***Glyvrar:*** kl. 20, Elsa Funding
***Húsum:*** kl. 19, Jógvan Fríðriksson
***Mikladali:*** kl. 20.15, Jógvan Fríðriksson
***Tvøroyrar kirkja:*** kl. 20, Martin R. Jacobsen
***Porkeris kirkja:*** kl. 19, Martin Restorff Jacobsen

**Hóskvøldið**
***Miðvágur:*** kl. 20, Mogens Tilsted Christensen
***Gjógv:*** kl. 19 Hans J. Joensen, biskupur
***Funningur:*** kl. 20 Emil Olsen
***Sjóvar kirkja:*** kl. 20 Jógvan Fríðriksson
***Ritvík:*** kl. 19, Inga Poulsen Dam
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 20.15, Inga Poulsen Dam
***Søldarfjørður:*** kl. 20, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 20, Marjun Lómaklett
***Sambýlið í Bøgøtu:*** kl. 19.30, Elsa Funding
***Fámjins kirkja:*** kl. 20 Jónsvein Bech

**Sunnukvøldið**
***Kvívík:*** kl. 17,
***Vestmanna:*** kl. 19, Martin R. Jacobsen
***Vestmanna kirkja:*** Filmur í kirkjukjallaranum í Vestmanna kirkju kl. 19.00: The Passion of the Christ (Mel Gibson)

**Gudstænastur**
**Boðannardag Mariu**
***Argja kirkja:*** kl. 11, Bergur D. Joensen, konfirmatión
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen, konfirmatión
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Bjarni Bæk, konfirmatión
***Kaldbak:*** kl. 12, Marjun Lómaklett
***Sørvágur:*** kl. 11, konfirmatión, David Johannesen
*Kvívík,* kl. 11, Mogens Tilsted Christensen
***Eiði:*** kl. 12 messa Emil Olsen
***Selatrað:*** kl. 12 Jógvan Fríðriksson
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Marjun Bæk
***Ritvík:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð (útvarpað).
***Christianskirkjan:*** kl. 11, altargangur, Niels Pauli Danielsen
***Viðareiði:*** kl. 12, Elsa Funding
***Húsum:*** kl. 12, altargangur, Magnus Brahé Jørgensen
***Mikladalur:*** kl. 15, Magnus Brahé Jørgensen
***Fámjin:*** kl. 12, Jónsvein Bech
***Hvalbiar kirkja:*** kl. 11, konfirmatión, Jette Paarup

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16 eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Linda Petersen talar, kl 18 evangeliskt møti, Sveinbjørn Jakobsen talar.
http://www.gospel.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Í dag kl 7 bøn.
Hósdagin kl. 7 bøn, kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúlin, kl. 18 møti v/ lovsangi og vitnisburðum.
Mánakvøldið kl. 17.15- 18 barnakórið venur, kl 19.30 fyrilestur v/Steen Palmqvist evni: Menningarskifti í hjúnalagnum.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Týsdag kl. 20 Hornvenjing.
Mikudag kl. 15 Bøn.
Kl. 19,30 Korpsráð.
Hósdag kl. 20 Heimaforbund, fyri allar kvinnur.
Sunnudag kl. 11 Møti.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Møti kl. 18 Toril og Niels Edvard Olsen tala og leiða.
Øll eru vælkomin.

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 24. mars kl. 19.30 Aglowfundur fyri kvinnur í Miðlahúsinum, Mariann Jacobsen talar um evni »Frælsið: Gud í okkum«.
http://www.aglow.fo

**Meingheitshúsið í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími Matt. 26, 1-25 v/ Bjartur F. Johannesen.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Reimund Langgaard.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Leo Hans Mikkelsen, evni: fyrigeving. Lavinda Halgaklett syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17 bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli.
Leygardagin kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Møti - Tummas Jacobsen talar, kl. 11.30 sunnudagsskúlin.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Týsdag kl. 18.55 Sangvenjing, Gospel Hearts kl. 19.00 Sangvenjing, Ebenezerkórið.
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdag kl. 17 Sangvenjing, Barnakórið og Kassia kl. 20 Ungdómsmøti - Talari: Rodmundur í Liða.
Leygardag kl. 9 Sangvenjing, Ebenezerkórið.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Lívdin á Brekku 3**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti.
**Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla**
kl. 10.30 Familjumøti har er evnið »Ávøkstur Andans - Spakføri«, Absalon Aargarð talar.
Kl. 11.30 samfelagsløta
Kl. 12 Á Tilbiðjunarmøtinum hevur Leiðslan »Visiónsmøti«
Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Kl. 12 Sunnudagsskúlin.
Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið samlast húsbólkarnir. Vit bjóða øllum at vera vælkomin.

**Hebron, Argir**
BeTwix verður týsdagin 20. mars kl. 19. Tiltakið er fyri ungdóm í aldrinum 5.-8. flokk.
Mikudagin 21. mars kl. 20, Bíbliutími og bønarløta.
Sunnudagin 25. mars:
Kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 11.30 Samvera við drekka
Kl. 12, Familjumøti. John Rajani talar.
Kl. 18 Møti - Vitin úr Klaksvík vitjar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron! www.hebron.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin. drekkamuður verður aftaná.

**Sandavágur - Sjómanskvinnuringurin**
kemur saman hóskvøldið 22. mars kl. 20 í Meingheitshúsinum. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar. Bússurnar verða tømdar.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 22.3.07 kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.